Nýggjar bøkur:
## Á skattaveiðu í Bíbliuni

**Heimamissiónsforlagið hevur júst givið út tvær barnabøkur. Tey eldru børnini kunnu fara á skattaveiðu í Bíbliuni, meðan tey minstu hava fingið sína egnu bønarbók**

**NÝGGJA BØKUR**

*Stóra Skattaveiðan* er ein øðrvísi bók á nógvar hættir. Við fýra børnum fara vit á spennandi skattaveiðu gjøgnum Gamla Testamenti í Bíbliuni. Í bókini finnur tú tekningar til Nóa ørk, tú fært loyvi til at hjálpa Ábrahami á hansara longu ferð, og at byggja sáttmálaørkina. Í bókini eru lummar við uppgávum og spølum, sum seta ferð á hugflogið. Hetta er ein spennandi háttur at læra søguna um Guds fólk. Bókin er ætlað børnum upp til 10 ára aldur, og er væl egnað til kristniundirvísing í skúlunum. Fótbóltsleikarin Tór Ingar Akselsen hevur týtt bókina úr enskum. Bønarbókin fyri børn er vakurt prýdd við myndum. Í bókini eru barnavinarligar bønir, sum kunnu vera við til at venja børnini at biðja til Guds og minna tey á, at Gud ansar øllum heiminum, og hvørjum einstøkum. Her eru bønir til ymiskar umstøður og til serstakar dagar, bønir fyri familju, vinum og skúlanum og at enda Faðir vár. Jóngerð Mikkelsen hevur týtt bókina úr enskum.

**ave**

# Av dansigólvi á leikpall

**Fjøruti áhugaleikfólk hava í vikuskiftinum verið í Klaksvík á sjónleikarastevnu, har Sjúðrakvæðini vóru reyði tráðurin**

**SJÓNLEIKUR**
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Teimum ungu dámdu serstakliga væl kvæðatemaið á árligu sjónleikarastevnuni, sum í varð hildin í Klaksvík um vikuskiftið*

Leikstevnan byrjaði fríggjakvøldið, tá útflutti klaksvíkingurin Árni Dahl hevði eina hugvekjandi frásøgn um Sjúrðarkvæðini. Á henda hátt fingu luttakararnir upp aftur betri innlit í Regin Smið, Brynhildar tátt og Høgna tátt, sum eru tey trý kvæðini ella tættirnir í tí, sum samanlagt verða nevnd Sjúrðarkvæðini.

### Jørð, luft, eldur og vatn

Á stevnuni varð arbeitt allan leygardagin í Ósáskúlanum við at flyta kvæði av gólvi á pall. Stevnufólkið varð býtt sundur í 4 arbeiðsbólkar, sum vóru Jørð, Luft, Eldur og Vatn, har Eyð Matras og Gunnvør Joensen virkaðu sum kveikjarar og hjálparar.



*Tað var nógvur dramatikkur í luftini, tá teir fýra bólkarnir, Jørð, Eldur, Vatn og Luft framførdu fyri hvørjum øðrum leygarkvøldið á sjónleikarastevnuni*

Seinnapartin leygardagin framførdu teir fýra bólkarnir so fyri hvørjum øðrum.

Tað sást beinanvegin, at væl varð arbeitt, og at luttakararnir høvdu fingið nógv burturúr, tí framførslurnar vóru serstakliga fjølbroyttar – onkur enntá í operaformi. Seinni um kvøldið var veitsla, har farið varð upp á gólv og kvøðið dúgliga.

### Stimbrandi fyri leikhugin

Fyrireikarnir vóru avbera væl nøgdir við stevnuna og fegnaðust serliga um, at teimum ungu dámdu hana serstakliga væl. Tey høvdu stóran áhuga fyri Sjúrðarkvæðunum og fyri tí dramatiska og tragiska í hesi klassisku føroysku frásøgnini við søguligum og sagnakendum evni úr Mið- og Eysturevropa.

Nú eru nøkur ár liðin, síðan sovorðin sjónleikarastevna seinast var í Klaksvík. Fyrireikarnir halada tað tí vera gott, at tráðurin nú verður tikin upp aftur, tí ongin ivi er um, at ein slík stevna er við til at halda lívi í leikáhuganum og enn meira at menna leikhugin í býnum.

Tað vóru Meginfelag áhugaleikara Føroya (MáF) og Klaksvíkar Sjónleikarafelag, sum í felag skipaðu fyri teirri árligu sjónleikarastevnuni í ár.


Uppisitarahjúnini



Birita og Kjalnes Petur

Kjalnes Petur var sonur Jóannes Petersen av Saltnesi

Birita var yngsta barnið hjá Jákupi Jacobsen (yngra Jákupi) á Miðgerði.

Eftirkomarar teirra hava givið bók út, ið er at fáa í bókabúðunum.

Sosialurin 341800


# Robbie Williams í Parkini




6. juli 2006 kemur Robbie Williams til Keypmannahavnar at spæla konsert á gamla heimavøllinum hjá Toda í Parkini. Tað er langt síðan, at tað gjørdist greitt, at Robbie skuldi spæla í Danmark í 2006, men nústaðni í dag er dagfestingin almannakunngjørd, skrivar BT.

Trý ár eru liðin, síðan Robbie seinast spældi í Parkini, tann konsertin var bæði minnilig og frálík. Robbie spældi annars á Nordic Music Event í Keypmannahavn fyri tveimum vikum síðan, og hóast bert talan var um eitt lag, fekk hann Forum at kóka.

Atgongumerkini verða at fáa í Fona handlum kring Danmark og á www.billetlugen.dk ella +45 70 263267 frá 21. november kl. 10.00. Væntandi verður gravgangurin stórur, og danska blaðið BT, væntar at bíðiraðir verða til atgongumerkjasøluna alla náttina framman fyri Fona handlum. Til ber at keypa upp til 4. atgongumerki pr. fólk.

**nud**